**Álit**

**í**

**Løgtingsmáli nr. 64/2019: Uppskot til samtyktar um at javnseta kvinnur og menn, tá umræður allar tryggingar og pensjónir í Føroyum**

Kristina Háfoss, Hervør Pálsdóttir, Bjørt Samuelsen, Høgni Hoydal, Sirið Stenberg og Beina L. Jacobsen, løgtingsmenn, hava lagt málið fram tann 11. februar 2020, og eftir 1. viðgerð tann 11. mars 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28., 30. apríl og 7. mai 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð LÍV, Betri Pensjón, Starvsmannafelagið, Samtak, Føroya Pedagogfelag og Helga Abrahamsen, landsstýrismann í umhvørvis- og vinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bjørt Samuelsen, Henrik Old, Bjarni Hammer og Bjarni Kárason Petersen) vísir á, at kvinnur og menn eiga at fáa sama mánaðarliga útgjald av lívrentu, tá talan er um sama inngjald. Heldur enn at brúka miðalivialdurin sum heild, velja tryggingarfeløgini at býta kvinnur og menn upp eftir kyni. Av tí at kvinnur í miðal liva longur enn menn, fáa tær í dag á leið 11% lægri mánaðarligt útgjald, tá talan er um lívrentu.

Hetta er ein lættur, men ikki rættur máti at býta eftirlønartakarar í bólkar. Hagtøl úr øðrum londum vísa, at størri munur er millum livialdurin hjá ymiskum samfelagsbólkum enn millum kynini. Eitt nú vísa kanningar í grannalondum, at munurin millum miðallivialdur hjá akademikarum og ófaklærdum liggur um 7-8 ár.

Føroysku hagtølini fyri lívsævi eru tíverri ikki býtt upp eftir t.d. inntøku og útbúgving, tøl, sum granskingarstovnar aðrastaðni ofta fáa til vegar. Føroysku hagtølini vísa tó eitt rák, har munurin á miðallivialdri hjá kvinnum og monnum støðugt er minkandi. Í 1990 livdu kvinnur í miðal 7 ár longur enn menn; í dag tykist munurin at vera minkaður niður í góð 4 ár.

Í ES og londunum rundan um okkum er bann sett fyri at gera kynsmun tá um ræður tryggingar, eisini lívrentutryggingar. Føroyska javnstøðulógin bannar mismuni millum kyn. Í útgjaldinum av fólkapensjón og samhaldsfasta verður ikki gjørdur munur grundað á kyn. Heldur ikki tænastumanna- og tingmannapensjónir gera mun. Munur verður heldur ikki gjørdur, tá talan er um bólkatryggingar. Flestu fakfeløg hava javnsett limir sínar í mun til eftirlønir, og tóku fakfeløgini, sum vóru til hoyringar, undir við uppskotunum.

Løgtingið álegði við lóg fólki at spara upp til egna eftirløn, stigvíst vaksandi til 12% av inntøkuni í 2026. Høvuðsendamálið við eftirlønarlógini var, at fólk í størri mun skuldu klára at forsyrgja sær sjálvum, tá tey gerast pensjónistar. Við tíðini verður egin pensjónsuppsparing størri partur av samlaðu upphæddini.

Kvinnur forvinna í Føroyum í miðal nógv minni enn menn, og av tí eru pensjónsuppsparingarnar hjá kvinnum í miðal lægri, og vandin fyri at gerast fátækur á ellisárum størri. Tá tryggingarfeløgini so

eisini velja at gera kynsmun á útgjaldi fyri sama inngjald av lívrentu, veksur hesin munur so hvørt, sum lógarfesta egna pensjónin gerst størri partur av samlaðu pensjónini.

Eftirlønarlógin ásetir í § 9 krav um, at í minsta lagi 45% av lógarásettu uppspardu eftirlønini skal útgjaldast sum lívrenta. Av tí at lógarkravið er lutfalsliga nýtt, eru tað enn sera fá, sum fáa lívrentuna útgjoldna eftir § 9. Tí eigur lógarkravda javnsetingin av útgjaldi fyri sama inngjald at verða gjørd skjótast tilber. Og javnsetingin eigur at vera fyri allar nýteknaðar lívrentupensjónir, umframt tær, sum verða útgoldnar smb. § 9, stk. 2 í eftirlønarlógini, eftir 30. desember 2020.

Tryggingarfeløgini kunnu sjálvi broyta mannagongd, men hava víst á, at skal tað broytast, mugu tryggingarfeløgini øll avtala at gera tað samstundis, ella tað má ásetast við lóg, tí annars kann tað skeikla marknaðin.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Johan Dahl, Jákup Mikkelsen og Beinir Johannesen) vísir á, at undir hoyringunum hava pensjónsfeløg víst á, at arbeitt verður við broytingum, ið skulu tryggja kynsneutralitet, tá tað umræður lívsrentutryggingar, og hava vit álit á, at avvarðandi pensjónstryggingarfeløg gera neyðugu broytingarnar.

Vit eiga at miða ímóti, at ójavnin ikki verður framhaldandi, og mælir minnilutin til, at landsstýrismaðurin kannar líknandi lóggávur í grannalondum okkara.

Undir hoyringunum hava pensjóns- og fakfeløg víst á ymisk viðurskifti, tá tað kemur til lívsrentutryggingar, millum annað § 9 í løgtingslóg um eftirløn. Minnilutin mælir til ístaðin at taka júst hesi viðurskifti burtur úr, ið uppskotið umrøðir, so skal heldur eitt arbeiði gerast, ið fevnir um øll tey viðurskifti, ið treingja til betran og endurskoðan.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 7. mai 2020**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Johan Dahl<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Henrik Old | Bjarni Kárason Petersen | Beinir Johannesen |
| | Jákup Mikkelsen | |